## VIÐMERKINGAR

# Vel loysingina, Jóannes!

**Javnaðarflokkurin má loysa seg úr haftinum í borgarligu sambandsgonguni. Landsstýrið leggur landið lamið fyri eina promillu í lønarsamráðingum. Men samstundis hava samgonguflokkarnir við sínum fíggjar- og skattapolitikki bundið seg til at hækka reallønina hjá teimum vælbjargaðu við 17%, og koyra tey lægstløntu niður í realløn.**

Høgni Hoydal



Neyvan var tað av tilvild, at formaður javnaðarfloksins avblásti stættastríðið á landsfundi floksins. Tí Jóannes Eidesgaard hevur sum løgmaður bundið seg til at reka ein politikk, sum longu hevur og – ikki minst – fer at økja munandi um stættarmunin í Føroyum.

Hetta harmist eg almikið um. Tí javnaðarflokkurin hevur saman við andstøðuni greiðan meiriluta á tingi fyri at reka ein samhaldsfastan politikk. Andstøðuflokkarnir hava lagt fleiri uppskot fram, ið høvdu verið gylt høvi hjá javnaðarflokkinum at hildið kós.

Men í sonevndu "realpolitisku" og "pragmatisku" kabaluni, sum løgmaður hevur svorið seg til, situr Fólkaflokkurin við øllum trumfum og stikkum, meðan javnaðarflokkurin mestsleppur at prýða andlitsmyndirnar á myndabløðunum, sum verða brúkt í politiska pokerspælinum.

### Fleiri bjargingarlínur er kastaðar

Má viðganga, at eg skilji ikki hví. Sjálvandi hevur tað týdning fyri javnaðarflokkin at vera í samgongu og hava løgmanssessin. Men um løgmaður vildi brúkt andstøðuna í meira jaligum politikki, so hevði hann kunnað ført ein politikk og eisini hildið ringastu uppskotunum og ringasta trýstinum frá Fólkaflokkinum aftur .

Tjóðveldisflokkurin hevur tildømis í sínum alternativa fíggjarlógaruppskoti skotið upp:

- at strika skattalættan,
- at leggja loft á rentustuðulin fyri tey, ið byggja fyri meira enn eina millión,
- at veita einligum forsyrgjarum dupultan barnafrádrátt
- at hækka fólkapensiónina fyri fátækar pensjónistar og minka hana fyri tey, ið hava omanfyri 25.000 kr. um mánaðin í aðrari pensjón.

Harafturat er meiriluti fyri at fáa skil á spekulasjónini í fiskiloyum. At gera eina veruligan pensjónsreform til frama fyri tey, ið hava minst. At stovna Búskapargrunn. Og at fáa ein framrættaðan vinnupolitikk.

Men hetta verður alt blokerað av Fólkaflokkinum. Onkusvegna tykist løgmaður ræddur fyri, at Fólkaflokkurin skal rýma. Men er Fólkaflokkurin ikki rættiliga einsamallur við sínum ráa politikki fyri teir sterkastu áhugabólkarnar? Er nakað at ræðast? Og hví fer løgmaður so langt, at hann ger ein asosialan politikk hjá Fólkaflokkinum til sín egna og verjir hann alment?

Eg fari at mæla løgmanni til, at taka bæði atfiningar og tey mongu, konstruktivu uppskotini hjá andstøðuni í álvara - og nýta hetta til at finna eina kós.

### Ongin stætt hevur framíhjárætt...

Tjóðveldisflokkurin hevur ein greiðan setning í síni stevnu frá 1948, sum er grundbulurin vit royna at stýra eftir hugsjónarliga og í praktiskum politikki. Har verður sligið fast, at Føroyar skulu verða eitt fólkaræði har "ikki eigur nakar einstaklingur ella nøkur serstøk stætt framíhjárætt til vald landsins og ognir. Føroyingar allir eiga somu samfelagsrættindi og hava somu samfelagsskyldur."

Henda samgonga hevur higartil selt burturav okkara fólkaræði og tjóðarrættindum til Danmarkar og hevur tømt landskassan. Men hon er eisini í ferð við at máa støðið undan møguleikunum hjá okkum at klára okkum sum eitt sjálvstøðugt, samhaldsfast samfelag.

### Frá teimum fátæku til tey ríkaru

Meðan útjaðarin verður lagdur lamin í ein viku orsakað av 0,1% í sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum, so fáa tey vælbjargaðu metstóra lønarhækking í gávu frá landsstýrinum. Uttan at hava samráðst og uttan at hava biðið um tað. Meðan tey lægstløntu – uttan nakrar samráðingar – rúka langt niður í realløn.

Meðan stríðst verður um promillur við samráðingarborðið, fer ein grov umfordeiling fram, har tikið verður frá tí fátæka og givið tí ríka gjøgnum lóggávu í tinginum.

Avtalaði skattalættin hjá samgonguni, sum vit vónaðu javnaðarflokkurin fór at steðga, er júst vorðin konfirmeraður. Undirskjalið um skattalættan skal haldast, sigur Fíggjarmálaráðið í tíðindaskrivi. Og tá alt er framt í 2008, so fer ein inntøka uppá 600.000 um árið at fáa um 43.000,- krónur beinleiðis niður í lumman.

Skuldi tað verðið tjent inn í nettoløn, so hevði tað svarað til eina lønarhækking uppá 100.000 kr. – ella 17%. Burturav av hesum 43.000 krónunum, hava tey vælbjargaðu so væl ráð at gjalda einar 3000-4000 krónur um árið til samhaldsfasta, barsilsskipanina, í hækkaðum kommunuskatti og í veggjaldi. Tey fara framvegis at hava knappar 40.000 krónur í yvirskoti, tá skattalættin er framdur.

Men fyri ein av lægstu bólkunum sum tey tímaløntu í verkamannafeløgunum ella tey lægstløntu hjá Starvsmannafelagnum, verður talan um undirskot og reallønarlækking.

Ein ársinntøka uppá 170.000 (og tað er høgt sett, tá vit hugsa um støðuna eitt nú í Sandoynni og Suðuroynni) fer at fáa 1.700 kr. um árið í skattalætta frá samgonguni. Men av hesum skulu tey gjalda meira til samhaldsfasta, til barsilsskipanini, í øktum kommunuskatti og í øktum veggjaldi. Tær 1.700 krónurnar røkka ikki til at gjalda tey nýggju gjøldini hjá samgonguni.

### Sig so her búgva javnaðarfólk í Føroyum...

Tær kommunurnar, ið eru ringast fyri, noyðast at hækka skattin til tess at fíggja barnavernd o.a. Eftirsum kommunuskatturin er proporsjónalur, meðan landsskatturin er progressivur, so fáa tær breiðstu herðarnar aftur her ein fyrimun, meðan tær smalru herðarnar skulu bera meira.

Tey lægstløntu fáa sostatt eina reallønarlækking, meðan tey vælbjargaðu fáa uml. 40.000 kr. um árið beint í lumman.

Sig so her búgva javnaðarfólk í Føroyum!

### Øktur stættarmunur afturfyri samhaldsfasta

Tað er mær ein stór gáta, at fakfelagsleiðarar ikki gera vart við henda ójavnað. Ístaðin tosar formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag um eitt hækkað avgjald í samhaldsfasta, sum ongantíð kemur at fremja nakran javnað í Føroyum, men bert fer at gera stættarmunin størri á ellisárum.

Um ein vælbjargaður – sum aloftast frammanundan hevur ein góða pensiónsskipan á arbeiðsmarknaðinum – velur at brúka tær 40.000 krónurnar, ið hann fær til gávus frá samgonguni, til eina privata pensjónsuppsaring, hvar stendur so ein tímalønt arbeiðskvinna móti honum? Harfturat fær tann vælbjargaði omaná alt eina líka stóra upphædd úr Samhaldsfasta, sum flakakvinnan.

Vit í Tjóðveldisflokkinum hava eina skyldu til – saman við Miðflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og helst pørtum av sambandsflokkinum – at royna at fáa Javnaðarflokkin aftur at virka fyri samhaldsføstum politikki. Hóast Javnaðarflokkurin ikki sigur seg vilja loysa frá Danmark, so er mín áheitan, at hann loysir seg úr haftinum hjá borgarligu sambandssamgonguni.

# Hægri útbúgvingar í Føroyum lúka ikki altjóða krøv

Annika Olsen

**Fríggjadagin í farnu viku stillaði eg landsstýrismanninum í mentamálum, Jógvan á Lakjuni ein skrivligan fyrispurning um føroyska luttøku í Bologne tilgongdini, ið er eitt heiti fyri eitt samstarv ímillum 45 lond í Evropa innan hægri útbúgvingar. Spurningarnar vóru hesir:**



Hví eru Føroyar ikki við í Bologne avtaluni?

Eru ítøkiligar ætlanir um, at Føroyar skulu innganga samstarv í Bologne avtaluna?

Kann landsstýrismaðurin útgreina hvørjar útbúgvingar eru góðkendar í altjóða høpi, og hvørjar útbúgvingar, ið ikki eru góðkendar ( sambært Bologne avtaluna)?

Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera fyri, at allar hægri útbúgvingar í Føroyum fáa altjóða góðkenning?

Útbúgving er ein av hornasteinunum undir eitt vælferðarsamfelag. Í visión 2015 verður útbúgvingarpolitikkurin sostatt høgt raðfestur sum ein partur av, at Føroyar skulu gerast millum fremstu tjóðir í 2015.

I Sorbonne 1998 bleiv avtala gjørd millum ráðharrar í skúlamálum úr Fraklandi, Onglandi, Týsklandi og Italiu um eitt felags stev innan hægri útbúgvingar í Evropa. Eitt ár seinni hittast ráðharrar aftur í Bologne fyri at útbyggja hetta samstarv. Hetta samstarvið hevur síðan fingið heitið Bologne avtalan.

Grundarlagið í hesari avtaluni er millum annað:
Ein harmonisering av útbúgvingunum
Eitt felags bachelor og master støði
Eitt felags pointssystem (ECTS-skipanin)
Gera tað lættari fyri næmingar og lærarar at lesa og undirvísa á øðrum hægri stovnum í Evropa (lestrar- og starvsmobilitetur)
Útbúgvingarnar skulu vera lættari at samanlíkna
Fremja Evropæiskt samstarv innan dygdarmennig
Staðfesta ábyrgdina hjá viðkomandi stovnum
Eftirmeting av útbúgvingarstovnum - bæði innanhýsis og uttanhýsis (akkreditering)
Samstarv um felags mannagond innan útbúgvingarskipanir

Síðan Frakland, Ongland, Týskland og Italia gjørdu hesa avtalu í 1998, eru fleiri evropeisk lond koman avtrat, harímillum Norra, Ísland og Danmark. Heili 45 lond hava í dag inngingið samstarv.

Tað kann tykjast løgið, at Føroyar ikki eru partar av avtaluni, meðan fleiri smátjóðir sum eitt nú Luxembourg og Liechtenstein, eins og Norra og Ísland, hava innginið samstarv. Harafturat eru eisini fleiri lond, sum ikki eru limir í ES, partar av Bologne avtaluni. At Føroyar ikki eru partar av Bologne avtaluni kann tykjast sera undranarvert, eftirsum landsstýrið hevur sett sær sum mál at gerast millum førandi tjóðir í heiminum í 2015, har útbúgingarpolitikkurin skal bera ein stóran part.

Tað er neyðugt, at Føroyar gerast limir í einari tílíkari avtalu sum Bologne avtalan, um føroyskar útbúgvingar skulu góðkennast í altjóða høpi. Tað er av stórum týdningi, at aðrir hægri stovnar í Evropa kenna til føroysku útbúgvingarnar, sostatt at føroysk lesandi frítt kunnu flyta frá einum hægri stovni til annan í Evropa uttan at missa tey fak, tey longu hava tikið á eitt nú Fróðskaparsetrinum. Hetta gevur ein størri fleksibilitet og mobilitet bæði hjá næmingum og stovnum.

Mangan eru føroysk lesandi komin í eina tvístøði, tá ið tey skulu flyta frá eitt nú Fróðskaparsetrinum og Sjómansskúlanum til ein annan hægri lærustovn í Evropa. Tvístøðan stendst av, at útbúgving teirra ikki er altjóða góðkend, og hava tey lesandi tískil ofta verið noydd at taka partar av útbúgvingini umaftur og í ringasta føri byrja heilt av nýggjum.

Ein annar trupulleiki er, at ikki allar føroysku víðarigangandi útbúgvingar hava góðkent bachelor støði. Hetta ger seg millum annað galdandi á Sjómans- og Maskinmeistaraskúlanum. Her ber ikki til hjá teimum lesandi at taka eina bachelor útbúgving og síðani taka eina kanditatútbúgving uttanlanda, tí at útbúgvingin á Sjómans- og Maskinmeistaraskúlanum ikki er altjóða góðkend. Hetta kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri Sjómans-og Maskinmeistaraskúlan. Vandi kann vera, at næmingar tá heldur vilja taka sjómans- og maskinmeistaraútbúgvingina uttanlanda, so teir fáa eina útbúgving við altjóða góðkenning.

Sjálvt um Føroyar ikki eru limir í ES, so ber tað væl til at fáa eina smidliga útbúgvingarskipan við Bologne avtaluni, soleiðis at hægri útbúgvingar í Føroyum og føroysk lesandi fáa altjóða gókenning og viðurkenning.